## Fólk seta búgv í Sandoynni

Skálavík/Skopun: Hóast eingin tunnilsætlan er sett í verk enn, er kortini líkt til at fólk eru bjartskygd í Sandoynni. Fleiri hava í øllum førum valt at seta búgv her. Í Skálavík eru tey í løtuni í ferð við at planera fyri nýggjum sethúsum, og sum skilst eru onnur á vegi. Í nýggju útstykkingini norðarlaga í Skopun eru fleiri sethús komin upp seinastu mánaðirnar. Her eru somuleiðis fleiri á veg.



## Lítið fiskaarbeiði

Sandur/Skopun: Fyrri í vikuni vóru liðin 10 ár síðani at Sandoy Seafood lótu dyrnar upp á Sandi og í Skopun. Hetta var til stóra gleði fyri fólkið, men í dag er støðan munandi broytt, skrivar heimasíðan bkv.fo. Sum skilst eru lítil sannlíkindi fyri at virkið á Sandi letur upp aftur, og gongst soleiðis sum oyggjarfólkið skilir støðuna, er stórur vandi fyri at virkið í Skopun ikki verður opið í so øgiliga nógvar mánaðir aftrat. Útróðarmenn í oynni hava trupulleikar at sleppa av við fiskin og at fáa ís, men teir vóna framvegis at virkini verða upplatin aftur.

# Vegurin skrædnar í Sandslíð



*Bæði persónbilar, bussar við skúlabørnum og tung ferðsla koyra gjøgnum líðina hvønn einasta dag. Nú er líkt til, at hesin gamli vegurin er vorðin ov gamal, tí nú er byrja at skrædna undan honum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tað eru ikki tespiligar umstøður, sum fólkið í eysturbygdunum á Sandoynni hava havt, tá tey skuldu í onnur støð. Nú er støðan upp aftur verri, ja beinleiðis vandamikil**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandoy:** Hvønn einasta dag koyra í miðal 500 bilar gjøgnum Sandslíð.

Hetta er ikki nøkur autostrada teir koyra eftir, tí vegurin er bæði smalur og ótíðarhóskandi til ferðsluna í dag.

Hetta veit oyggjarfólkið, men nú er støðan vorðin enn verri og vandamiklari: Nú er vegurin enntá byrjaður at skrædna undan.

Miðskeiðis í líðini eru sett upp skelti, sum vísa staðið har tíðarinnar tonn hevur slitið henda vegin.

- Tað er ikki so nógv at siga til at støðan er soleiðis. Hetta er í roynd og veru ein av elstu vegastrekkjunum í landinum, siga sandoyingar.

Nú vegurin er skrædnaður hevði onkur enntá lagt ein tummastokk í sjálva rivuna. Hesar "mátingar" vístu greitt, at rivan bara vaks dag frá degi.

Fólk liva við óttanum, tí tað er ikki óvanligt at smærri og størri steinar detta oman á vegin.

Tíbetur vísa fólk varsemi í ferðsluni gjøgnum Sandslíð, og koyra eftir umstøðunum. Bert fá óhapp eru skrásett her seinastu árini.

### Átrokandi ábøtur

Hjá landsverki eru tey fult greið um umstøðurnar hjá teimum sandoyingum, sum dagliga eru tvungnir at koyra gjøgnum Sandslíð.

Í løtuni verður arbeitt við eini verkætlan um gerð av nýggjum vegi gjøgnum líðina.

Neyðugt er at gera átrokandi ábøtur á partar av vegastrekkinum. Tvey feløg eru biðin um at koma við tilboði uppá hetta arbeiðið.

- Ymiskar loysnir verða kannaðar í løtuni, - eisini møguleikin fyri at gera ein tunnil, verður sagt av Landsverki.

Kostnaðurin í ár til prosjekteringina er 300.000 krónur, og skulu ábøtur haraftrat gerast fyri 700.000 kr.

Hinvegin verður víst á, at skal ein onnur varandi loysn finnast fyri hetta vegastrekkið, verður kostnaðurin fyri hesa mettur at liggja millum 21 og slakar 36 mió krónur.

> *Hetta er í roynd og veru ein av elstu vegastrekkjunum í landinum*

# Páll vil hava svar

**- Nú kann Bjarni fáa ein møguleika at greiða frá, nær vit fáa Sandoyartunnilin, sigur tingmaðurin, Páll á Reynatúgvu. Hann hevur sett vinnumálaráðharranum fyrispurning um hetta málið.**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*- Sandoyingar ynskja svar um Sandoyartunnilin, sigur Páll á Reynatúgvu*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Sandoy:** - Hvørjar samferðsluætlanir hevur sitandi samgonga viðvíkjandi einum komandi Sandoyartunnil?, spyr Páll.

Sum sandoyingur veit hann alt um, hvønn týdning ein slíkur tunnil fer at hava fyri hansara oyggj.

Men nú eru hann og oyggjarfólkið so smátt farin at ótolnast eftir at frætta, nær gongd kemur á málið.

Í skrivliga fyrispurninginum spyr hann millum annað um kanningarnar, um linjuføringina, nær arbeiðið verður boðið út og hvussu verður við fíggingarmynstrinum.

- Fyri at gera gitingar og illgitingar til skammar, fær landsstýrismaðurin her eitt høvi at greiða frá hesi ætlanini, nú bert fáir mánaðir eru eftir av valskeiðinum, sigur Páll á Reynatúgvu.

### Spurnartekin

Í viðmerkingunum til fyrispurningin vísir Páll á, at løgmaður hevur fleiri ferðir ført fram, at undanfarnar samgongur fingu í lag undirsjóvartunlarnar til Vágar og Norðoyggjar.

- Sitandi samgonga skuldi samtykkja Sandoyartunnilin, sum so skuldi gerast liðugur í komandi valskeiði, vísir hann á.

Í summar hevur júst hesin tunnilin verið eitt heitt evni í fjølmiðlunum og í kjaki manna millum, men einki sæst til nakra ítøkiliga ætlan.

- Tíðin gongur og sandoyingar eru av álvara farnir at seta spurnartekin við lyftini hjá samgonguni um tunnilin.

## FAKTA

**Sandoyartunnilin**

Arbeiðið fevnir í fyrsta lagi um innleiðandi jarðfrøðiligar kanningar fyri at kanna, um tað ber til at gera ein undirsjóvartunnil millum Streymoynna og Sandoynna, og hvar hann liggur best. Fleiri linjuføringar hava verið í uppskoti, og fleiri teirra eru eisini kannaðar. Undirsjóvartunlarnir eru millum gott 9 og knapt 12 km til longdar.

(Kelda: landsverk.fo)